# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Í 13 ár bleiv eg jagstraður og mátti flýggja og kundi ikki vera hjá familjuni. Tað var sum at vera deyður*

*(Radovan Karadzic)*

# Aftur ein kvinna á ovastu rók í Ísarael

**Tann 50 ára gamla Tzipi Livni kann gerast fyrsta kvinnan í ísraelska forsætisráðharrastólinum síðani Golda Meir, men gøtan er illgongd**

– Tær góðu kreftirnar hava vunnið, segði ísraelski uttanríkisráðharrin, Tzipi Livni, tá tað var greitt, at hon hevði vunnið formansvalið í stjórnarflokkinum Kadima. Men sigurin á flutningsmálaráðharranum, Shaul Mofaz, var næstan so tepur, sum hann kundi vera og eisini væl teprari, enn nakar hevði væntað. Tað vóru teir umleið 74.000 limirnir í Kadima, sum høvdu rætt til at velja formannin, og tá avtornaði, hevði Livni fingið 432 fleiri atkvøður enn Mofaz.

Sum formaður í Kadima skal Tzipi Livni skipa stjórn, men tað verður kortini ikki, fyrr enn verandi forsætisráðharrin, Ehud Olmert, leggur frá sær. Sambært ísraleksu fjølmiðlunum fer hann frá 2. oktobur. Tað hendir, eftir at ákæruvaldið hevur avdúkað óreglusemi hjá forsætisráðharranum. Eitt nú skal hann í loyndum hava fingið pengar frá einum amerikonskum ríkmanni, og hann skal hava fingið fleiri samsýningar fyri somu uttanlandsferðir.

Flestu ísraelsmenn vænta sær meiri av tí nýggja Kadima-formanninum. Á yngri árum var Tzipi Livni agenturhjáfregnartænastuni Mossad, og tey flestu halda hana vera skilagóða og reiðiliga, skrivar The Jerusalem Post.

Sum uttanríkisráðharri hevur hon teir seinastu mánaðirnar staðið á odda fyri einari serligari nevnd, sum hevur tingast við palestinar um eina friðaravtalu, og hon hevur verið eitt av undangongufólkunum í hesum arbeiði, hvørs mál er, at palestinar skulu fáa egið ríki.



*Tzipi Livni var ovurfegin um formansstarvið, men gleðin kann gerast stokkurt*

*(Mynd: Polfoto)*

### Helst val

Politiskir eygleiðarar í Ísrael siga, at júst hennara stríð fyri einum palestinskum ríki kann leggja henni meinbogar í vegin, tá hon skal skipa stjórn. Tað er greitt, at tann víðgongdi átrúnaðarflokkurin Shas fer at leggja treytir við fyri at halda fram í stjórnini, og flokkurin hevur longu boðað frá, at hann verður ikki við í nakrari stjórn, sum tingast um framtíð Jerusalems.

Teir flestu ísraelsku eygleiðararnir vænta, at tað verður torført hjá Tzipi Livni at fóta sær á ovastu rók, og fleiri teirra vænta, at hon verður noydd at skriva út tjóðartingsval longu í vetur.

# Gatwick til sølu

**Næststørsta floghavnin í London er til sølu fyri millum 20 og 30 milliardir krónur**

Felagið, sum eigur Gatwick-floghavnina sunnan fyri London, hevur sett floghavnina á sølulista, og stjórin, Colin Matthews, viðgekk, at tað var við ringum tannabiti, at hann hevði lagt navn til avgerðina.

Sambært Reuters liggja fleiri feløg framvið at keypa, og serliga eru tað flogfelagið Virgin Atlantic og týska felagið Fraport, sum hava víst Gatwick áhuga. Fraport rekur frammanundan ta stóru floghavnina í Frankfurt. Leiðslan í Virgin Atlantic hevur boðað bretsku myndugleikunum frá, at felagið fer at royna at fáa fleiri feløg at taka seg saman til at bjóða.




*Gatwick er 45 kilometrar sunnan fyri London (Mynd: Polfoto)*

Felagið BAA, sum eigur Gatwick, eigur seks aðrar floghavnir, men hevur fingið boð um at selja tríggjar, tí verandi eigaraviðurskifti eru kappingaravlaðandi. BAA var upprunaliga alment, men bleiv einskilt í 1986 og varð í 2006 selt einum sponskum felagi.

Sambært Reuters verður mett, at Gatwick kann seljast fyri millum 20 og 30 milliardir krónur.

## STUTT SAGT

### Moussa í Íslandi

Í morgin kemur aðalskrivarin á Arabisku Samgonguni, egyptin Amr Moussa, til Íslands á almenna vitjan.

Á ferðini í Reykjavík skal hann hitta Ingibjørg Sólrún Gísladóttur, uttanríkisráðharra, og Geir H. Haarde, forsætisráðharra. Hann skal eisini hitta uttanríkispolitisku nevndina hjá Altinginum.

Í Reykjavík skal Amr Moussa taka lut í einum almennum fundi, sum lærdi háskúlin í Íslandi skipar fyri, og sum skal umrøða viðurskiftini millum ísraelsmenn og palestinar. Orðaskiftið verður á enskum máli.

### Verja ossetar og abkhasar

Russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, segði í gjár, ar russiski herurin fer at verja teir báðar fyrrverandi georgisku landspartarnar Suðurossetia og Abkhasia ímóti møguligum ágangi uttaneftir.

Medvedev skrivaði í gjár undir ein sáttmála við Suðurossetia og Abkhasia um framtíðar sambandið millum teirra og Russland, og tað var í tí viðfangi, at hann lovaði teimum báðum økjunum verju.

Russiskir hermenn hava eftirlit við landamarkinum hjá Abkhasia og Suðurossetia, sum bæði hava mark við Georgia, sum tey fyrr vóru partur av. Í sáttmálanum, sum bleiv undirskrivaður í gjár, stendur eisini, at russiskir hermenn skulu tryggja markið.



*Russiski forsetin Dmitrij Medvedev (Mynd: Polfoto)*